# Bilar

Nr. 43 • hósdagur • 3. mars 2005 • 79. árg.

**Fiat Panda 1,2 4x4 Climbing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Motorurin: | 1,2 litur 4 syl. bensin við 60 hk | | |
| 0-100 km/t: | 20,0 sek | | |
| Bensinnýtsla: | 15,2 km/l | | |
| Dekkstødd: | 185/65-14 | | |
| Stødd og vekt | | | |
| Longd: | 357,0 cm | Prísur: | kr. 160.000,- |
| Breidd: | 159,0 cm | Søluumboð | Sp/f Nordcar |
| Hædd: | 162,0 cm | | Smiðjugerði 4 |
| Eginvekt: | 975 kg | | FO-100 Tórshavn |
| Viðførisrúm: | 230 litrar | | Tel. 308080 |

Fiat Panda 4x4 Climbing:

# Praktiskur býbilur og »off-roadari«

**Fiat Panda er nú komin í "off-road" útgávuni 4x4 Climbing, sum er ein praktiskur býbilur, sum við 16 cm fríhædd eisini er væl egnaður til vetrarkoyring uttan fyri vanliga koyrivegin**




*Fiat Panda 4x4 Climbing er ein praktiskur býbilur og "off-roadari"*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Eins og tann gamli Fiat Panda, sum var á marknaðinum næstan óbroyttur í umleið 20 ár, fæst nýggi Panda eisini sum "off-road". Talan er um útgávuna 4x4 Climbing, sum er ein lítil fittur býbilur, sum eisini klárar seg væl uttan fyri vanliga koyrivegin.

Panda 4x4 Climbing er ein praktiskur býbilur, sum samstundis er væl egnaður til vetrarkoyring. Serliga er tað elektriska servostýringin, sum kann stillast við knøttinum "City", ið ger bilin sera lættan at koyra við í býnum.



*Pand 4x4 Climbing innan. Elektriska servostýringin, sum kann stillast við knøttinum "City", ger bilin sera lættan at koyra við í býnum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Støddin á bilinum ger sítt til, at hann roynist so væl á ósløttum undirlendi. Hann er stuttur, aksilfrástøðan stutt (230,5 cm), og fríhæddin upp á 16 cm saman við permanentari 4x4" drívmegi ger, at hann kann koyra har sum vanligir bilar í somu stødd hava ilt við at koma fram.

Bilurin er væl innrættaður og plássið væl útnýttað, bæði hvat persónum og viðføri viðvíkur. Hann sær eisini annarleiðis út við svørtum listum og fendarum í kúfangarunum framman og aftan.

Panda 4x4 Climbing er ein nútímans og framkomin bilur í allar mátar. Motorurin er ein 1,2 litur bensinmotori við 60 hk.

Bilurin hevur nógvar innbygdar trygdarskipanir og ein brandtrygdarskipan syrgir fyri at hurðarnar ikki eru læstar, og ljósið í kabinuni tendrar, um okkurt skuldi verið áfatt.

Standard útgerðin í Panda er t.d. fløguspælari, el-síðurútar, fjarstýrt sentrallás, elektrisk servostýrng, hæddarstilling av ratti og førarasetri.

Fiat Panda 4x4 Climbing kostar úr kr. 160.00,-




*Við 16 cm fríhædd er Panda 4x4 væl egnaður til vetrarkoyring uttan fyri vanliga koyrivegin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Bilverkstaðir skulu kannast

Arbeiðseftirlitið fer nú aftur undir eitt átak runt landið, har trygdarviðurskifti á arbeiðsplássum verða kannað

Í hesum umfari verða bilverkstøð vitjað, og ætlanin er at vera komin runt innan juni mánað í ár.

Nýggj løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi var samtykt í Løgtinginum og sett í gildi á sumri ár 2000.

Tað er hendan lógin um arbeiðsumhvørvi og tilhoyrandi kunngerðir, sum Arbeiðseftirlitið umsitur, ið eru tær heimildir, eftirlitið verður framt eftir.

Arbeiðseftirlitið sigur í tíðindaskrivi, at tað serliga eru niðanfyristandandi viðurskifti, sum hugt verður eftir:

- Vælfarsrúm
- Bilgrøv
- Billyftur
- Sproytikabina
- Epoxy arbeiði
- Luftskifti
- Evni og tilfar
- Trygdarskipan
- Útgangsumstøður
- Hiti